VETRARKVØLD í Listaskálanum

desember 1995–februar 1996

Listasavn Føroya skipar aftur í vetur fyri hugnakvøldum í LISTASKÁLANUM. Hesi kvøld verða evni á skránni, ið hava við myndlist at gera. Av tí at vit leiga filmir og sjónbond, noyðast vit at taka atgongugjald – 30 kr., men uppi í hesum gjaldi er kaffiella temuður

Høskvøldið 30. nov. kl. 21

Holografi

Holografi – ein filmur um ljósið og tað rúmliga. Hugtakið holografi verður brukt um tridimensionala avmynding, har tað rúmliga, ið vit einans kunnu uppfata við eygunum, verður fært yvir á hologrammið. Hetta verður gjørt við lasaraljósi. Í filminum greiðir ein myndlistamaður frá holografiinum sum einum øðrvísi sansaligum myndamedii. Filmurin kemur eisini inn á meira heimsspekiligar lutir í hesum sambandi, m.a. spurningin um hologrammið er eitt møguligt modell fyri ein heimsmynd. *Irene Werner Stage SFC DK 1987. 30 min.*

John Heartfield, fotomonteur

Tann týski listamaðurin John Heartfield (1891 1968) brúkti liv sítt til at greiða frá samtiðini. Serliga eydnaðist hetta honum í brotamyndum, har hann setti saman fotomyndir úr gerandisdegnum. Liv hansara og listarliga arbeiði verður lýst í hesum filmi, sum tvinnar saman listasøgu og politiska søgu. Heartfield var ið at seta á stovn Dadaismuna, ið vendi borgaraskapinum og list tess bakið, men hann noyddist brátt at taka støðu til samfelagsgongdina. Hansara greiðu viðmerkingar til nazismuna, tá ið hon tók seg upp, noyddi hann longu í 1993 at flyta til Prag, í 1938 til London. Eisini eftir kriggið hevði list hansara politiskan brodd. Høvuðstemaið í filminum er nýtsla Heartfields av listini sum vápn í striðnum móti nazismuni. *Cinegrafik. Helmut Herbst D 1977. 63. min.*

Høskvøldið 7. des. kl. 21

Sonja Ferlov Mancoba

Ein lýsing av danska myndahøggaranum, ið býr og arbeiðir í París. Vitjað verður hjá Sonju Ferlov og manni hennara, afrikanska málaranum Ernest Mancoba, í listaskemmuni og stovuni. Vitjað verður eisini hjá bronsustoypara, ið stoypir ein av skulpturum hennara, og á Musée de l'Homme við afrikanskari list, ið hevur givið henni listarlig hugskot. *T. Glarbo, E. Preisler, G. Købke Sutton og A. Vinterberg DK 1983. 37 min.*

Peter & Pierre

Listamaðurin Pierre Alechinsky og steinprentarin Peter Bramsen arbeiða saman um eitt steinprent í verkstaðnum hjá Bramsen í París. Filmurin fylgir gongdini, frá Alechinsky ger sína tekning á litografiska steinin, til steinprentið »Encrier de voyage« (ein ferðabekkhúsi) er liðugt – í fimm litum og eftir tryprentumfør. *SFC og Danmarks Radio. Ole Henning Hansen DK 1985. 35 min.*

Høskvøldið 4. jan. kl. 21

Glasmosaikkur

Ein filmur um glasmosaikkin, ið málarin Preben Hornung gjørdi til høvuðssætið hjá De danske Sukkerfabrikker í Keypmannahavn. *De danske Sukkerfabrikker. Tue Ritzau DK 1968. 11. min.*

Ljós

Filmurin vil vísa, hvat ljós er. Vit hoyra um, hvat vísindini siga, og hitta persónar sum Newton, Huygens og Gallilei. Listamenn, sum Monet, Cézanne, Renoir, Matisse o.fl. hugsaðu nógv um ljósið í málningunum. Filmurin lýsir skiftandi ljós í náttúruni og roynir at finna poesiina í hesum. »Náttin er ein málningadúkur« og ljósið gevur litirnar, verður tikið til í filminum, sum eisini snýr seg um ravmagnsljós, ljósmyndir og film. Filmurin sigur sína søgu við myndum, tónleiki og skrivaðum teksti. Einki orð verður talað. *Jens Jørgen Thorsen. SFC. DK. 1987. 42 min.*

Veving

Ein filmur um ymiskt tilfar og amboð, ið hava við veving at gera. Tær tríggjar vevkonurnar Pernille Ponsaing, Olga Tesch og Jane Balsgaard greiða frá og vísa, hvussu hugskotini koma fram og verða til veruleika í litavali, tilfari og arbeiðslag. SFC.Ole Schelde. DK 1976. 21. min.

18. januar kl. 21

Dagar uttan navn

Filmurin fylgir svenska myndahøggaranum Peter Tillberg í arbeiði hansara við einum skulpturi, inn í gerandisdagin og aftur í barndómin. *Anders Widoff. S 1986. 40 min.*

Yvirmálarin

Fyri svenska málaran *Erland Cullberg* er »yvirmálaríið« eitt áhaldandi liv andi stríð. Hann varð tiðliga schizofrenur – fekk, sum hann sjálvur sigur, »psykiskt krím«. Einans gjøgnum arbeiði sítt, við málningalistini, hevur hann kunnað hildið sjúkuna burtur, vunnið á henni og tey seinnu árini spakuliga tikið seg úr myrkrinum, ið hevur havt vald á honum. *Anders Widoff. OPT. S 1980. 30 min.*

1. februar kl. 21

Den döande dandyn

Tað ovurvirkna og sjálvbrennandi liviðið hjá *Nils Dardel* listamanni er miðdepilin í hesum filmi, ið snýr seg um korini hjá skapanini. Tey tiggju árini, hjúnalagið við Thora Klinckowström vardu, eru karmur um frásøgnina. Anders Wahlgren. S 1989. 85 min.

15. februar kl. 21

Tað vakra er torført

Carl Fredrik Hill kom saman við Strindberg og fleiri øðrum svenskum listamonnum til París í 1874. Men har kendi hann seg sera einsamallan og helt seg meira burtur frá hinum. Gongdin í filminum, ið lýsir liv og arbeiði Hill's, byrjar í 1878 í París. *Anders Wahlgren. S. 1985. 85 min.*

List – við Folke Edwards

Ein filmur um svenska list – Marie Louise De Geer, John-E. Fransen, Carsten Regild, Rolf Björlind og Bruno K. Oijer. Folke Edwards, gitni leiðarin fyri Göteborgs Konstmuseum, greiðir frá. *Pierre Stähre. S 1985. 45 min.*

Franciska Clausen

Franciska Clausen er danskur málari, sum longu í 1920árnum fekk áhuga fyri nýggju listini, fyrst í Berlin, síðan í París. Hon var ímillum fyrstu kvinnuligu abstraktu málararnar í Europa og næmingur hjá kubistinum Fernand Léger og konstruktivistinum Piet Mondrian. Í filminum hitta vit hana, nú hon 85 ára gomul litur aftur á liv sítt. *Anders Wahlgren. S 1984. 45. min.*

Broytingar

kunnu koma fyri í hesi skrá!



Konsertir í Listaskálanum

23. desember kl. 16.00
Kristian Blak, Sharon Weiss, Daniel Rye og Fiona Parker
Tollaksmessukonsert

28. desember kl. 19.30
Sámal Petersen, violin, og Ólavur Jakobsen, guitar
Duoin spæir verk m.a. eftir Paganini, Black, Ysaye og Corelli
KONSERTFELAGIÐ

Jólaframsýningarnar

í Listaskálanum eru opnar frá 10. desember til 4. februar leygardag–sunnudag frá kl. 14–17, tó ikki jólaaftan og jóladag, 30. desember og nýggjársaftan.